# Fjarðahús og Fróði hava keypt Damor

**Fjarðahús, Timburhandil & Byggibúð hevur, saman við P/F Hjá Fróða, keypt Sp/f Damor, ið húsast á Hjalla í Tórshavn**

HANDILSVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Tveir av nýggju eigarunum í Damor, Fróði Sigvardsen og Regin Joensen saman við Per Mortensen, fyrrverandi eigara*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

- P/F Fjarðahús hevur við hesum gjørt eitt strategiskt keyp, ið styrkir støðuna hjá Fjarðahúsum á byggimarknaðinum og gevur kundunum ein sera áhugaverdan møguleika at handla alt til húsið á einum og sama stað.

Hetta sigur Óli M. Hansen, stjóri í P/F Fjarðahús, sum hevur keypt Damor frá Per Mortensen.

Nýggju eigararnir siga, at fólk, sum skulu keypa, byggja ella umbyggja hús, kunnu longu komandi ár leita sær inn í eina nýggja byggimiðstøð á Hjalla.

- Har verður alt at fáa til húsið - líka frá timburi og amboðum til máling, køkar og el-lutir.

Nýggja og 6.000 fermetrar stóra byggimiðstøðin stendur væntandi klár í 2007, og orsøkin til, at hon kann gerast veruleiki, er, at tríggjar sterkar fyritøkur nú kasta saman.

Endaliga avtalu um at keypa SP/F Damor, ið m. a. selur køkar, hvítvørur, V. H. S.-lutir, el-útgerð og mangt annað, er gjørd í vikuskiftinum.

- Talan er um eitt strategiskt keyp, sum fyrst og fremst ber í sær, at kundarnir hjá øllum trimum fyritøkunum nú fáa eitt heilstoypt keypsupplivilsi. Tá byggimiðstøðin er reist, fæst stórt sæð alt, sum skal brúkast til eini hús, frá okkum á einum og sama stað. Tað er ein stórur fyrimunur fyri kundarnar, og vónandi styrkir tað okkara fyritøku, ið nú er nógv víðkað, sigur Óli M. Hansen.

Hann vísir á, at júst hesar tríggjar fyritøkurnar – Fjarðahús, Hjá Fróða og Damor – hóska sera væl saman, tí eingin teirra hevur somu vørur til sølu, tó at vøruúrvali hjá teimum trimum fyritøkunum hóskar væl saman.

Per Mortensen, ið átti SP/F Damor, hevur valt at selja sína fyritøku, og hann ætlar at takast við annað starv frameftir.

Fróði Sigvardsen, ið eigur P/F Hjá Fróða, er vorðin partaeigari í P/F Fjarðahús, og hann er settur sum stjóri í Damor.

Partarnir eru samdir um, at keypsprísurin er í trúnaði.

Eftir at fyritøkurnar hava kastað saman, starvast tilsamans knappliga 20 fólk í P/F Fjarðahús.

Vit, fólkið í Føroyum…

Stjórnarskipanarnevndin arbeiðir við at smíða nýggja føroyska stjórnarskipan. Grundarlagið undir hesum arbeiði er frágreiðing frá gomlu Grundlógarnevndini og Fyrra flaggdagsálit frá 2004. Í Stjórnarskipanarnevndini eru politikarar og serfrøðingar. Nevndin skal lata landsstýrinum álit og uppskot til stjórnarskipan í seinasta lagi 31. desember í ár.

**Almennur kunningarfundur um nýggja føroyska stjórnarskipan**

í samkomuhøllini í Vestmanna skúla mikukvøldið 6. september 2006 kl. 19.30

Stjórnarskipanarnevndin fer komandi mánaðirnar at skipa fyri almennum kunningarfundum kring landið.

**Fyrsti fundurin verður í samkomuhøllini í Vestmanna skúla mikukvøldið 6. september 2006 kl. 19.30.**

Formaðurin í nevndini fer at greiða frá arbeiðinum at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan. Eisini fer hann at lýsa ásetingar um búrættindi.

Skrivarin fer at greiða frá heimasíðuni hjá nevndini.

Høvi verður at seta spurningar og at ogna sær ókeypis tilfar um stjórnarskipanararbeiðið.

Stjórnarskipanarnevndin
*Faroese Constitutional Committee*

J. C. Svabos gøta 14 · 100 Tórshavn · ssn@ssn.fo · www.ssn.fo